## 300 fólk á Slættanesi

Umleið 300 fólk vóru til serligt tiltak á Slættanesi í gjár Felagssangur, harmonikutónleikur og føroyskur dansur vóru á skránni, tá umleið 300 fólk hugnaðu sær á Slættanesi í gjár. Veðrið var av tí allarbesta, og tí var møguligt at borðreiða úti til øll tey, sum høvdu leitað sær norður á Slættanes. Á skránni vóru eisini røður. Sigrið Dalsgarð hugleiddi um barnaárini á Slættanesi, og Árni Jacobsen tosaði um, tá hann sum blaðungur var lærari á Slættanesi. Martin Restorff Jacobsen, prestur las úr gamlari lestrarbók. Í sambandi við tiltakið sigldi gamli ferðabáturin Ólavur millum Oyrargjógv og Slættanes, skrivar joanis.fo

## Fullur ferðamaður sló løgreglumann

Ein 40 ára gamal føroyingur, sum kom við flogfari til Billund í gjár, endaði í geglinum í Vejle. Tá maðurin kom úr flogfarinum í Billund seinnapartin í gjár, hevði hann fingið í meira lagi av sterkum á flogferðini, og hann sýtti fyri at gera eftir boðum frá løgregluni. Ístaðin fyri byrjaði hann at sláa og sparka ein løgreglumann, skrivar JydskeVestkysten. Tað endaði við, at løgreglan handtók mannin og fór við honum á løgreglustøðina í Vejle, har hann svav rúsin av sær. Maðurin varð latin leysur á middegi í dag, men hann sleppur neyvan so. Sambært blaðnum noyðist hann helst í rættin seinni fyri tað, sum hendi á flogvøllinum í Billund í gjár. Sum skilst verður hann skuldsettur fyri harðskap ímóti embætismanni í arbeiði.

# Roynd at seta eld á í kirkjuni við Gjógv

**Um vikuskiftið hevur onkur verið inni í kirkjuni við Gjógv og roynt at seta eld á. Kriminalpolitiið kannar málið**

ELDÁSETING
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tá kirkjutænararnir komu í kirkjuna við Gjógv í sambandi við eina brúðarvígslu leygardagin, varnaðist ein teirra, at ein brunamerki var á øðrum stólpanum við kórsgáttina, og at ein pappírslepi við brunamerki lá á lesipultinum. Morgunin eftir varnaðist klokkarin, at eldur hevði verið í altardúkinum, og at nakrar síður í einari sálmabók, swum lá frammi í kóri, høvdu brunamerki.

Sofus Johannesen, urguansari og kirkjuráðslimur, sigur, at brunamerkið á altardúkinum var ikki leygardagin, og tí er greitt, at talan er um tveir tilburðir við eldáseting.

Málið er meldað til løgregluna. Kristian Martin Joensen, sýslumaður í Runavík, sigur, at málið verður kannað sum ein roynd at seta eld á, og tí er málið latið kriminalpolitinum í Havn, sum skuldi fara til Gjáar í dag at kanna viðurskiftini. Sýslumaðurin sigur, at eingin er undir beinleiðis illgruna í sambandi við málið.

Gjáar kirkja hevur altíð staðið opin, og hon hevut fingið góðan frið, sigur Sofus Johannesen. Men eftir tað, sum er hent um vikuskiftið, hevur kirkjuráðið gjørt at av læsa kirkjuna - fyribils í hvussu er.



*Altardúkurin hevur týðiligt merki av eldi*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# Rúna Sivertsen skiftir flokk

**Vantandi møguleiki at arbeiða politiskt í Fólkaflokkinum fekk fyrrverandi tingkvinnuna at taka seg úr flokkinum í gjár**

POLITIKKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Rúna Sivertsen, fyrrverandi tingkvinna fyri Fólkaflokkin, stillar væntandi upp fyri Sjálvstýrisflokkin til komandi val*

Sum støðan er í løtuni, sær Rúna Sivertsen sær ongan møguleika at gera sína ávirkan galdandi í Fólkaflokkinum longur. Tí hevur hon boðað flokkinum frá, at hon ber seg undan sum valevni fyri Norðoya Fólkafloksfelag til komandi løgtingsval.

### Sett uttan fyri

Rúna Sivertsen sigur, at hon hevur umhugsað sína støðu í Fólkaflokkinum í longri tíð. At hon tekur avgerðina nú, er kanska eitt sindur av tilvild. Hinvegin dylir Rúna Sivertsen ikki yvir, at tað harmaði hana at verða sett uttan fyri Landsstjórnina hjá Fólkaflokkinum í 2004.

- Formella grundgevingin var, at eg ikki longur búði í økinum. Men eg varð ikki eftirspurd og fekk heldur ikki møgleikan at stilla nakran annan upp fyri meg, sigur Rúna Sivertsen og leggur afturat, at hon líka síðani stórt sæð ikki hevur havt møguleika at arbeiða politiskt innan flokkin.

### Prinsipiell avgerð

Rúna Sivertsen vísir aftur, at hon nú tekur seg úr Fólkaflokkinum, tí hon er ónøgd við, at hon ikki kom inn á ting eftir seinasta val.

- Eg eri farin uppí politikk, tí eg vil sleppa at vera virkin politskt og gera meg galdandi í tí dagliga arbeiðinum – ikki bara 4. hvørt ár. Eg var politiskt virkin, langt áðrenn eg nakrantíð stillaði upp fyri Fólkaflokkin. Satt at siga, hevði eg ikki væntað, at eg fór at verða vald inn á ting, so tað var ikki tí eg fór uppí flokkin í síni tíð, sigur Rúna Sivertsen.

Hon leggur afturat, at hennara avgerð snýr seg mest um at markera eitt principp.

- Prinsipielt haldi eg, at ein politiskur flokkur eigur at virða tey fólk, sum hava vilja til at leggja nógvu orku í at arbeiða fyri flokkin. Skal hetta verða mátin, flokkar fara við sínum stuðlum, so verður eisini ringt at fáa kvinnur at stilla upp, sigur Rúna Sivertsen.

### Stillar upp fyri Sjálvstýrisflokkin

Rúna Sivertsen hevur samstundis boðað Fólkaflokkinum frá, at hon framyvir fer at brúka sína politisku orku innan Sjálvstýrisflokkin. Tað kann eisini væl hugsast, at hon stillar upp fyri Sjálvstýrisflokkin til komandi val, sigur hon.

- Eg eri fyrst og fremst borgarlig og sjálvstýrissinnað. Í so máta hóskar politiska skráin hjá Sjálvstýrisflokkinum mær best av teimum flokkum, sum eru at velja ímillum í løtuni, sigur Rúna Sivertsen og leggur afturat.

- Eg vil á ongan hátt gera Fólkaflokkinum fortreð við hesi avgerð. Tíðin er bara komin, til at eg sjálv má sleppa víðari, sigur fyrrverandi fólkaflokskvinnan.